tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov

Marknaðardeild: Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen
Blaðfólk: Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dánjal Højgaard

Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Høgni Mohr
Yngd: Jákup Mørk

Myndamenn: Jens Kristian Vang, Ólvur Haraldsen
Útgevari, uppseting: Sp/f Sosialurin
Bústaður: Argjavegur 26, Argir

Postadr: Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Telefon: 311820
Telefax. 314720
e-mail: post@sosialurin.fo
Lýsingar: lysing@sosialurin.fo
Prent: Sosialurin

Ov bláoygt

Oddagrein

Eftir fyrsta samráðingarumfar og tíðindafundin í Tinganesi týsdagin kann sláast fast, at tað er eydnast Anfinni Kalsberg, løgmanni, at fáa føroyingar í martýrleiklutin: »Danir fóru illa við okkum, tá vit komu við okkara sjálvsøgdu krøvum«.

Hetta er ein endurtøka av tí, sum hendi, eftir at fyrst bankarnir og síðani alt føroyska samfelagið fór á húsagang fyrst í 90-unum. Tá danir settu treytir, sum ein og hvør annar kreditorur hevði gjørt, eydnaðist tað loyssingarfólkum at øsa upp eina ónøgd ímóti dønum, sum endaði við fullveldissamgonguni eftir síðsta val.

Á hesum stað skal ikki berast í bøtuflaka fyri donsku stjórnini, tí nógv kundi verið gjørt øðrvísi – bæði undan 1992 og eftir 1992, tá danska embætismannaverkið setti órímulig krøv móti føroyingum við vælsignilsi frá donskum politikkarum, sum ikki hava neyvan kunnleika til Føroyar og føroysku fólkasálina.

Men landsstýrið eigur eisini at taka í egnan barm. Spurningurin er, um samráðigaruppkastið var nóg gott? Var tað orðað ov nógv út í æsir? Og spurningurin er sanniliga eisini, um landsstýrið ikki var ov illa fyrireikað, tá tað kom til búskaparliga partin.

Til tað fyrsta er at siga, at uppkastið leggur ikki upp til eitt gott samráðingarlag. Krøviini eru so nógv, at onkur hevur nevnt hetta eitt olmussukrav. Harafturat er spurningurin, um tað er rætt at orða eitt uppskot til ein sáttmála millum tvær tjóðir. Ístaðin átti landsstýrið heldur at felt niður tær stóru linjurnar til tað fyrsta samráðingarumfarið.

Taka vit so búskaparpartin, so kundi tað ikki undra nakran, at kravið um skiftistíð varð 3-4 ár. Hetta hava umboð fyri stjórnina sagt, og hetta hava umboð fyri andstøðuna sagt. Tí átti landsstýrið at verið betri fyrireikað við útrokningum yvir, hvussu heildarveitingin kann lækkast í stigum.

Nú stendur eftir, at landsstýrið krevur, at Føroyar krevja, at heildarveitingin skal halda fram eini 60 ár afturat. Og tað ynskir eingin føroyingur, sum hevur eitt vet av ábyrgdar- og sjálvbjargiskenslu í sær.

Hóast landsstýrið hevur lagt áherðslu á, at tað var væl fyrireikað til samráðingarnar, so skerst ikki burt, at nógv hava ta fatan, at landsstýrið hevur gjørt seg til skammar, tá tað snýr seg um búskaparpartin. Nógv orð eru feld á blað, alt ov nógv, meðan alternativ vantaðu, tá tað snýr seg um búskaparpartin og skiftistíðina.

Landsstýrið bvar ov bláoygt!

Sosialurin

Christian í Grótinum søkkladin við bryggju í Klaksvík. Hann skuldi landa í Fuglafirði í gjár.

Mynd:Jens Kr.Vang

24 tímar og fult skip

Fyrr í vikuni kom Christian í Grótinum søkkladin á Klaksvík. Við 2.000 tons av svarkjafti, sum teir hava fiskað í ES-sjógvi vestanfyri Írland

DÁNJAL HØJGAARD

Túrarnir eru stuttir, nú svartkjafturin er fyri. Teir fóru úr Føroyum hósdagin í síðstu viku, fyltu lastina eftir einum samdøgri og vóru aftur í Føroyum mánadagin.

Christian í Grótinum hevur bíðað eftir tørni, at avreiða hjá Havsbrún í Fuglafirði. Teir væntaðu at sleppa framat á miðdegi í gjár.

Prísurin í Føroyum er í løtuni 50 oyru kilo. Hann hevur verið betri fyrr. Í 1998 t. d. var meðalprísurin fyri svarkjaftin nærum tvífalt so høgur - 95 oyru kilo.

Tað tekur umleið líka langa tíð at tøma Christian í Grótinum, sum at fylla hann. Tá ið tey tvey túsund tonsini eru landaði verður farið beina kós aftur á svartkjaftaleiðirnar fyri sunnan.

Hetta er besta fiskitíð til svarkjaftin, sum verður fingin bæði í ES-sjógvi og altjóða sjógvi. Svartkjafturin gongur norðureftir og kemur seinni í føroyskan sjógv.

Lærarar ganga mótmælisgongu

Tolið hjá sáttmálasettu lærarunum í trætuni við fíggjarmálastýrið er við at verða uppi. Fyri enn einaferð at vísa á ónøgd sína við viðurskiftini, fóru lærararnir í dag - hósdagin - mótmælisgongu frá Føroya Lærararskúla niðan á Undirvísingar- og Mentamálastýrið við Hoyvíksvegin.

Á Undirvísingar- og mentamálastýrinum skulu lærararnir handa Signari á Brúnni, landsstýrismanni, mótmælisskriv.

Mótmælisgongan endar í Tinganesi.

Sambandsflokkurin landsfund í Øravík

Fyri fyrstu ferð bjóðar ein føroyskur flokkur fjølmiðlunum við landsfund

EIRIKUR LINDENSKOV

Hetta vikuskiftið hevur Sambandsflokkurin landsfund í Øravík. Sum nakað nýtt í føroyskum politikk hevur Sambandsflokkurin bjóðað fjølmiðlunum at vera við til landsfundin.

Hetta hevur eingin føroyskur politiskur flokkur gjørt áður, hóast eitt nú Javnaðarflokkurin onkuntíð hava boðið fjølmiðlunum við til partar av landsfundinum.

Landsfundurin hjá Sambandsflokkinum byrjar í annaðkvøld klokkan 20^{30} - tá Smyril er komin suður. Fundurin heldur fram leygarmorgunin klokkan 10, tá gestarøðarin, Anne E. Jensen, ES-tinglimur úr danska Vinstraflokkinum, flytir fram røðu.

Fundurin endar við veitslu um kvøldið.

Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri hjálpsemi og sýnda samkenslu, tá kæra mamma, vermamma, omma og langomma okkara

ANNA KATHRINA HEINESEN
Leirvík

lá sjúk, doyði og varð jarðað.

Takk fyri blómur, kransar, gávur og telefonsamrøður.

Tykkum mongu, ið fylgdu henni til seinasta hvíldarstaðið, takka vit hjartaliga.

Vegna familjuna

børnini

Bóðu bara um størri kvotu fyri at kunna selja skipini

– Eingin eigur at fáa kvotu bara til at selja. Jørgen Niclasen sigur ósatt um býti av sildakvotunum, sigur Atli Hansen, formaður í Felagnum Nótaskipum

ÁKI BERTHOLDSEN

– Eingin eigur at fáa kvotur, bara við tí fyri eyga at selja hana aftur.

Tað er grundjónarmiðið hjá felagnum Nótaskipum.

Atli Hansen, formaður í felagnum, sigur, Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sigur ikki satt, táið hann í útvarpinum og Sosialinum týsdagin greiddi frá, hvussu frystiskipini Fram, Pelagos og Krúnan høvdu fingið sína sildakvotu.

– Tað er ikki rætt, at tað upprunaliga varð býtt javnt ímillum nótaskipini og frystiskipini.

Í fyrstani var so gott sum øll kvotan latin nótaskipunum, men John Petersen, sum tá umsat fiskivinnumál, heitti á Felagið Nótaskip um at taka upp samráðingar við teir, sum áttu Fram og Pelagos, tí at hesir høvdu søkt um at fáa onnur og størri skip, men at inntøkugrundarlagið var ov lítið.

– Vit samdust við Fram og Pelagos um eina kvotu og hetta góðkendi landsstýrismaðurin. Men avtalan var eisini, at varð kvotan ikki brúkt, skuldi hon fella aftur til nótaskipini.

Atli Hansen sigur, at landsstýrismaðurin læt tá frystiskipunum eina felagskvotu uppá 5.000 tons.

Eisini Prestland kom upp í hetta býtið og sostatt vóru tað trý skip, sum høvdu loyvi at fiska av hesi felagskvotuni.

Seinni var loyvið hjá Prestland flutt Krúnuni, sum felagið Djúphav eigur.

Atli Hansen sigur, at sum ein og hvør kann fáa at vita frá Fiskimálastýrinum, hava Fram og Pelagos gjørt minni enn lítið burturúr at fiska sild hesi árini, tey hava havt kvotu.

– Eitt nú hava tey onki fiskað í fjør og tí tykist tað løgið, at tey nú skulu hava størri kvotu fyri neyðini.

Formaðurin í Felagnum Nótaskipum sigur, at á fundinum í Fiskimálastýrinum 26. januar, sum Jørgen Niclasen sipar til, vóru umboð fyri Felagið Nótaskip, teir, sum eiga Fram og Pelagos, Svend Aage Ellefsen fyri Krúnuna og formaðurin í Reiðarafelagnum.

– Landsstýrismaðurin heitti á partarnar um at finna eina semju og hann heitti eisini á formannin í Reiðarafelagnum um at hjálpa til at finna eina loysn.

Dagin eftir, 27. januar, skrivaði felagið Nótaskip til Landsstýrið, har vit endurtóku, at vit sóu onga orsøk til at hækka kvotuna hjá frystiskipunum.

Eitt nú søgdu vit, at vit halda tað ikki vera rímligt, at kvotur, sum eru lætnar sum hjáveiðikvotur fyri at geva atgongd til ávís øki, ella ein ávísan fiskiskap, kunnu menna seg til at blíva sjálvstøðugar kvotur. Vit halda eisini, at skip, sum eru flutt inn undir ávísum hámarki, framvegis eiga at vera undir hesum hámarki.

Vit boðaðu frá, at eitt grundsjónarmið hjá felagnum er, at eingin eigur at fáa kvotur bara til at selja.

-- Frystiskipini Fram og Pelagos, hava ikki verið í uppsjóvarvinnu leingi. Tey hava lagt um til gulllaks og rækjur og nú tykist, sum um teir ætla at gevast heilt, tí tað sigist, at teir hava selt gulllaksakvoturnar til botnfiskatrolararnar.

– Endamálið við at biðja um størri kvotur til hasi skipini, kann tí bara vera við sølu fyri eyga, søgdu vit við Landsstýrið.

– Tíverri fingu vit so syndarliga rætt, sigur Atli Hansen. Í somu viku, sum Fram og Pelagos fingu umleið 1.100 tons av sild í part, og eitt sindur av makreli, omaná kvotuna, skrivaðu eigararnir undir sølusáttmála.

Hann sigur, at sum skilst, var søluprísurin væl omanfyri tað, hann hevði verið, um silda- og makrelkvotan, ikki varð hækkað.



– Í somu viku, sum Fram og Pelagos høvdu fingið eina eyka kvotu upp á 1.100 tons í part, vórðu tey seld. og tað skilst , at prísurin var væl hægi, enn hann hevði verið, um teir ikki høvdu fingið kvoturnar

Ferðslulógin í rættarnevndina

Nýggja ferðslulógin, sum varð løgd fyri tingið herfyri, kom ikki til viðgerðar framløgudagin. Lógaruppskotið var so umfatandi, at tingmenn vildu hava stundir at seta seg inn í málið, og 1. viðgerð varð tí sett til 16. mars. Men heldur ikki tá høvdu tingmenn hug at viðgerða ferðslulógaruppskotið, sum varð beint beinleiðis í rættarnevnd løgtingsins. Hvussu langa tíð viðgerðin í rættarnevndini fer at taka er óvist, men ferðslulógin er so ikki komin aftur á dagskránna fyri 2. viðgerðir, skrivar Ferðslutrygd á heimasíðuni.

Tey ungu ynskja royndarkoyra við foreldrunum

Ein lítil roynd hjá Ferðslutrygd at sponsorera eina ungdómssending á Rás2 um ung í ferðsluni vísti, at meginparturin av teimum ungu ynsktu, at ein skipan við royndarkoyring í eitt ella tvey ár saman við foreldrunum varð sett í gildi í Føroyum. Tey ungu mettu stutt sagt, at tey ungu dugdu ov illa at koyra, og at orsøkin var, at tey høvdu ov fáar royndir. Víst varð í fleiri føroum til Noreg, har tey ungu fáa loyvi at koyra við foreldrunum frá tí at tey eru 16 ár. Í Noregi hinvegin verða nú helst strangari krøv sett til hesa royndarkoyring, tí uppskot er frammi um kravdar ástøðiligar royndir, áðrenn tey ungu sleppa at koyra. Koyrilærararnir í Noregi vísa á, at teir ikki hava fingið minni at gera av hesi skipanini – tey ungu, sum hava koyrt við foreldrunum, duga oftast betri at handfara bilin, men hava ofta "arvað" óvanarnar hjá foreldrunum, eins og tey ikki klára seg betur til ástøðiligu royndirnar enn onnur, skrivar Ferðslutrygd á heimasíðuni.

Internetsambandið skal betrast

JOHN JOHANNESSEN

Seinastu dagarnar hevur verið so at siga ómøguligt at fingið samband við internetið hjá teimum viðskiftafólkunum hjá Føroya Tele, ið hava uppringt samband.

Fleiri fólk, Sosialurin hevur tosað við, hava onkran dagin roynt í tímar, áðrenn tað er eydnast at koma upp á netið. Eisini blaðfólk her á blaðnum hava havt trupulleikar av vánaliga sambandinum.

Men nú skulu viðskiftafólkini hjá Føroya Tele aftur fáa samband við internetið júst tá teimum nýtist tað. Tveir tøkningar arbeiddu allan dagin í gjár við at seta upp nýggja útgerð.

Útgerðin skuldi væntandi vera liðugt sett upp áðrenn arbeiðsdagurin í gjár var lokin ella fyrrapartin í dag, og tá skuldu trupulleikarnir við internetsambandinum hjá viðskiftafólkunum hjá Ólivant aftur verið álítandi.

Bilpakkar Summarið 2000
www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00

4 fólk í bíli

Danmark

Fráf. Tórshavn 19/5 26/5 2/6 9/6 1/9 8/9
Fráf. Hanstholm 13/5 20/5 27/5 3/6 10/6 17/6 19/8 26/8 2/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Hanstholm ella hinvegin
kr 775,- fyri hvønn

Noreg

Ferðist bíliga, Tórshavn-Bergen ella hinvegin
kr 480,- fyri hvønn

Hetland

Ferðist bíliga, Tórshavn-Lerwick ella hinvegin
kr 385,- fyri hvønn

Island

Fráf. Tórshavn 17/5 24/5 31/5 7/6 14/6 21/6 9/8 16/8 23/8 30/8
Fráf. Hanstholm 25/5 1/6 8/6 15/6 22/6 24/8 31/8 7/9
Ferðist bíliga, Tórshavn-Seyðisfjørður ella hinvegin
kr 728,- fyri hvønn

Skotland

Ferðist bíliga, Tórshavn-Hetland-Skotland ella hinvegin
kr 1.273,- fyri hvønn

e-mail: booking@smyril-line.fo